Útvarps-nevndin hevur innstillað

Útvarpsnevndin hevur nú innstillað tvey av leiðarastørvunum í Útvarpinum. Trý fólk eru innstillað til hvørt starvið, sum er leiðari av programmdeildini og tónleikadeildini. Harafturat hevur nevndin innstillað til eitt starv sum programmmeðarbeiðara. Innstillingarnar eru latnar landsstýrinum, sum møguliga fer at taka støðu á fundi hósdagin.

Dansa í Vágum

Norðstreymoyar Dansifelag fer komandi leygarkvøld vestur í Vágar at dansa. Í hesum sambandi heitir nevndin á limirnar um at boða frá luttøku í seinasta lagi í annaðkvøld.

Eingin undirvísing

eftir summarfrítíðina á studentaskúlanum í Gøtu, verður skúlamálið ikki loyst nú

Yrkisfelag studentaskúla og HF-lærara hevur samtykt, at er projekteringin av nýggja studentaskúlanum ikki byrjað áðrenn skúlaársbyrjan 1989/90, fer tað at sýta limum sínum at undirvísa á skúlanum.

Hetta sigur felagið í opnum brævi til løgmann. Felagið skrivar:

Um góða viku eru 7 ár liðin, síðani løgtingið samtykti at seta skúla á stovn í Eysturoy.

Byrjað varð í gomlum niðurløgdum skulabygningum hjá Gøtu Skúla — og annars í leigaðum hølum, ið vórðu riggað sodánt til, at til bar at vera har. Men heldur ikki meir.

Talan var um fyribils loysn, til hóskandi skúli varð bygdur.

Sum vera man við slíkari neyðloysn, lýkur hon ikki tær treytir, ið settar verða til tryggleika og arbeiðsumstøður annars á slíkum stovnum.

Arbeiðsettirlitið hevur — tykkum kunnugt — kolldømt stórar partar av skúlanum so dyggiliga, at náttúrligt er at seta sær spurningin, um tað ber til at lata undirvising fara fram fyri hundratals ungdómum á slíkum staði.

Yrkisfelagið hevur viðgjørt henda spurning nakrar ferðir, men hvørja ferð sligið seg til tols við, at ein permanent loysn var í eygsjón.

Hesa meting bygdu vit á, at leiðandi politikarar úr øllum flokkum uttan Sjálvstýrisflokkinum bundu flokkar sínar til at leggja spurningin um, hvar skúlin skuldi vera, fyri løgtingið og lata atkvøðugreiðslu í tingsalinum vera avgerandi. Politikararnir, ið — beinleiðis spurdir hvør sær — játtaðu at loysa knútin á henda hátt, vóru: Jógvan Sundstein fyri Fólkaflokkin, Pauli Ellefsen fyri Sambandsflokkin, Vilhelm Johannesen fyri Javnaðarflokkin, Petur Reinert fyri Tjóðveldisflokkin og Adolf Hansen fyri Kristiliga Fólkaflokkin. Hilmar Kass úr Sjálvstýrisflokkinum vildi ikki geva slíkt lyfti. Hetta var á veljarafundi við Gøtugjógv 25. oktober 1984.

Hetta visti seg kortini ikki bera til, uttan at málið partvís skuldi tengjast upp í onnur skúlamál. Úrslitið varð hin sonevndi »skúlapakkin«, har ymsir skúlar vórðu lagdir kring landið, so kabalan fekst at ganga upp. Nóg nógvir politikarar í nóg nógvum valdømum fingu sín skúla at reypa sær av í ti tilstundandi valstríðnum. Leikurin, ið fór fram, hevði einki við útbúgvingarpolitikk og skúlapolitisk mið at gera, men var ein landsumfatandi togtogan millum lokalpolitikarar, har tað ráddi um at bjarga sær onkran skúla inn um kommunumarkið. Eftirsum leikurin fór fram á løgtingi, var sjálvsagt neyðugt at geva honum ein landpolitiskan ham, so vist varð til »Miðnámsálitið« frá oktober 1985 og »Tilmæli um útbúgvingar« frá mars 1987 frá landsskúlafyrisitingini, ið bygdi á hetta álit. Men hetta vóru álit, ið ongantíð høvdu fingið politiska viðgerð í tinginum. Hetta var fyri ári síðani.

Burtur úr hesi sugguni spurdist kortini tað, at skúlin varð lagdur í Gøtudali, hóast ógreitt, nær hann skuldi byggjast, tí eingin raðfesting var millum hesar nógvu skúlar.

Landsstýrið, ið sat, setti tó skjótil á beinanveg og setti nevnd at fyrireika bygging á ásetta stað.

Men síðani hevur val verið og nýtt landsstýri er komið til. Tingið er nakað óðrvísi samansett, so til ber at leggja nýggjar kabalur millum nýggjar samgongur av lokalpolitikarum.

Málið tykist snøgt sagt at vera endað í somu naggatóðn sum fyri 7 árum síðani.

Sum hetta mál hevur verið hagreitt av landsins kosnu umboðum, hava vit einki álit á, at tað verður loyst í bræði.

Nú er alt vorðið so óvist, at felagið vil ikki longur gera frávik frá vanligum reglum fyri tryggleika og arbeiðsumstøðum annars.

Felagið hevur tí á eykaaðalfundi summarmáladag gjørt hesa samtykt:

Yrkisfelag Studdenta- og HF-lærara krevur at projekteringin av nýggjum studentaskúla er farin í gongd áðrenn skúlaársbyrjan 1989/90.

Annars fer felagið at sýta limum sínum framhaldandi at undirvísa undir ábyrgdarleysum umstøðum.

— Og lat hetta vera greitt: Vit fara ikki at lata okkum tøla av uttanumtosi um fleiri kanningar av figgjarligum og pedagogiskum fyrimunum við at leggja skúlan her ella har.

Nú má tann avgerðin fella, sum hevur verið útsett í 7 ár.

Okkara vón er sjálvsagt, at málið fær eina virðiliga loysn í hesi viku, men um hetta ikki ber til, so brúkið heldur hjáløgdu krónuna at slaa platt og krónu millum Gøtudal og Kambsdal enn at tveita landið út í politiska kreppu og gera Føroya landi fyri skomm um í øllum umheiminum.

Stýrisins vegna
Jógvan Mørkøre, form.

14. andi hevur ongantíð viðgjørt útifrystingina av Ova Mikkelsen í fleiri ár. Hvussu ofta møtti Ove fyri Hergeir? spyr Atli Dam at enda.

jan

Torvmoldskast í 14. anda

Nú um dagarnar hevði 14. September, málgagnið hjá Tjóðveldisflokkinum, rættiliga niðursetandi og hunddálkandi grein á forsíðuni við yvirskriftini »Hilmar Bech slapp ikki inn«. Í greinini, sum mest er lík einum dulnevndum lesarabræv ella kanska onkur av politisku ábyrgdarmonnum tjóðveldisfloksins hevur skrivað og innihaldið er so grovt, at viðkomandi ikki torir at seta sítt navn undir, verður m.a. formaður javnaðarfloksins, Atli Dam, lagdur undir lík og ólíkt.

Vit hava biðið Atla Dam um eina viðmerking til hesa skrivingina. Hann sigur:

— Hatta er heilt burturvið og hartil óndsinnað.

Øll vita, at vit í javnaðarflokkinum hava eitt gott samarbeiði og arbeiðsbýti eisini um tingarbeiði. Vit hava sjálvsagt ta meginreglu at seta mann í annans stað, tá hesin berst frá. T.d. havi eg í 15 ár, meðan eg sat sum landsstýrismaður/løgmaður, latið tingsessin til næsta mann á listanum óansæð hvør hesin var, og vit hava eitt nú havt nr. sjey á listanum inni onkuntíð. Hvi skuldu vit brøytt hesa støðu?

14. andi má hava havt fremmanda orðatakið — alt óføroyskt fellur teimum jú fyrst í tanka og munn — at álop er besta verja í huga. Teir ætlaðu helst at fjala útyvir tingformannsins kloddutu leiðslu av tingsetuni.

Tingsetan skuldi enda fyri 32 døgum síðani sambært kunngerð Hergeir Nielsens, men hann hevur ikki megnað at fáa tingið til hús enn, hóast fráfaringarnátturðin fýra ferðir hevur verið á veg niðan í tingið. Hann bleiv so kortini etin fyri 14 døgum síðani.

Hesi skandalu, at vit reelt — onga samgongu hava, í hvussu er onga, sum kann stýra hesum landi, eydnaðist ikki longur at fjala, hóast torvmoldskast 14. anda, tí nú í gjár kunngjørdi Hergeir Nielsen, at tingið varð hildið inni til »svarta, blanka onga nyttu«.

Henrik Old fór til Senegal sjálvandi uppá orð formannsins, at nú var tingsetan liðug, og hann hugsaði ti ikki um at leggja skriv eftir seg, men nú tingið bleiv í hvussu er 33 dagar seinkað, hevur Henrik havt høvi til at geva telegramboð frá sær.





3 svara
Mín meining

Eiga vit at byggja ungdómshús í Havn?

Kristianna Norðoy, skulanæmingur

— So avgjørt ja. Ungdómurin hevur sum er ongastaðni at fara uttan til ítrótt. Og tað kann ikki vera rætt. Tey eru mong, sum ikki iðka ítrótt, men eisini tey, sum eru ítróttarfólk, hava brúk fyri einum ungdómshúsi.



Torfinn Smith, blaðmaður

— Sjálvandi skulu vit tað. Og tað skal vera nú. Væl veit eg, fritíðartilboðini eru rættiliga mong í dag, men kortini tørvar ungdóminum eitt stað, har tey kunnu hittast og hugna sær um kvøldarnar. Tey ungu eiga sjálvi at skipa fyri tí, sum har skal fara fram. Eitt ungdómshús hevði ikki minst verið ein tryggleiki hjá foreldrunum.

Skarpheðin Njallson, skulanæmingur

— Ja, vit eiga at byggja ungdómshús í Havn. Tað er ov kalt at skula vera úti um kvøldarnar, tí har er jú einki stað at fara inn í. Tað kann einhvør siggja, at ungdómshús er harðliga tiltrongt.

Lagt til rættis: Sissal og Jón